Stundin komin at taka tjóðskaparmerkið í álvara

Elin Heinesen

Føroyahúsið í Keypmannahavn hevði flaggdagshald hóskvøldið, 25. apríl 2002, har Elin Heinesen varð biðin at halda ræðuna. Elin Heinesen er ritstjóri í danska almannagagnliga felagnum, Komiteen for Sundhedsoplysning, sum gevur út bøkur, bóklingar og bløð um heilsumál, og so er hon eisini ritstjóri á fleiri heimasíðum, m.a. www.fo-dk.dk, sum viðgerð viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Hennara áhugi í hesum spurningi speglast aftur í røðuni, har hon – nú valið stundar– roynir at hyggja at aðalspurningunum omanífrá og venda teimum á høvdið fyri at koma inn til beinið: Hvat er at velja ímillum?:

Ørkymlandi hugtøk

Í dag hevur Merkið verið vundið á stong manga staðni – í Føroyum og kanska eisini hjá onkrum her niðri. Føroyska flaggið fekk heitið Merkið, tí flaggið er merki um tjóðskap føroyinga í umheiminum eitt tjóðskaparmerkið. So tá vit í dag heiðra Merkið, heiðra vit eisini tjóðskap okkara. Tí er tað nærliggjandi ein slíkan dag sum í dag at hugsa eitt sindur nærri um føroyska tjóðskapin. Ikki minst nú føroyingar bert um fáar dagar fara á løgtingsval eitt val, sum fer at hava avgerandi týdning eisini fyri tjóðskaparspurningin.

Tað stendur fast, at tá val er í hondum, tekur spurningurin seg um loysing ella samband upp. Aftur leika tey í um henda æviga spurningin í valstríðnum í Føroyum, og sum føroyingum vant verður ikki søkt móti miðjuni, har roynt verður at byggja brýr um gjáir. Nei, hvør parturin lamenterar um hin partin og søkir sær soleiðis longur og longur út á hvør sína rás, er ógjørligt er at røkka hvørjum øðrum. Einasta sum kann sláast fast er, at ósemjan ræður sum vant. Og so eru vit líka vítt har sum vit altíð hava verið.

Men hví er hetta so? Eftir mínari meting eru tað millum annað hugtøkini loysing og samband og tvíbýtingin millum teirra, sum forbrongla alt, tí tey fáa fólk til at býta seg upp fyri ella ímóti og til at síggja nakað heilt annað fyri sær enn tað, sum tað veruliga snýr seg um. Verða hugtøkini gjølliga greinað sundur, gerst tað greitt, at tað er púra burturvið at tosa um loysing mótvegis sambandi. Sum um ein gjørdist leysur av øllum og misti alt samband við umheimin (og veruleikan?), um t.d. loysing varð vald framum samband!? So einfalt er tað sjálvandi ikki. Tað er tí av stórum týdningi at royna at gera seg leysan av slíkum ørkymlandi og misvísandi hugtøkum, sum seta seg í vegin fyri at vit kunnu síggja klárt. Hví ikki kalla ein spaka fyri ein spaka, sum danir plaga at taka til?

Kunnu føroyingar liva við at vera hálv-danir?

Valið snýr seg ikki um einvegis samband í merkingini at binda saman bond – ella einvegis loysing í merkingini at loysa øll bond og kvetta alt samband. Nei, tað snýr seg um at velja sjálvræði ella ikki at velja ímillum at arbeiða fyri fullum sjálvsavgerðarrætti (demokratii) fyri føroyingar í Føroyum, ella hin vegin at staðfesta, um danir enn skulu hava rætt at leggja seg út í føroysk viðurskifti. Tað er hetta, sum er aðalspurningurin. At loysa eitt sindur her og binda eitt sindur har á ein annan hátt enn í dag, og harvið vinna føroyingum nøkur rættindi og nakrar møguleikar, teir ikki hava í dag.

Spurningurin er, um tað ber til at fáa fult sjálvræði innanfyri ríkisfelagsskapin. Ber tað til at halda uppá nøkur serlig tjóðskaparrættindi fyri føroyingar innanfyri ríkisfelagsskapin? Annað enn bara tað reint mentanarliga?

Og so snýr tað seg eisini um virðing – virðingina frá útheiminum mótvegis føroyingum og so føroyinganna egnu sjálvsvirðing, sum er nær tengd at tí fyrra. Ynskja føroyingar at verða viðurkendir sum egið fólk í umheiminum? Ella ynskja teir framvegis at verða eitt slag av hálv-dønum í eygunum á øllum øðrum uttan sær sjálvum? Kunnu føroyingar framhaldandi liva í hesi skizofreniini?

Loysing eitt mótafyribrygdi?

Ein hevur so ofta í hesum valstríði hoyrt, at ynski um eitt sjálvstøðugt Føroyar, (sum summi rópa loysing), verður skýrt sum eitt stokkut mótafyribrigdi. Men at kalla hetta so, er veruliga at lata eyguni aftur. Tí hetta er ein spurningur, sum søguliga sæð heilt náttúrligt er vorðin meira og meira átroðkandi, jú fleiri málsøki føroyingar hava yvirtikið undir heimastýrislógini.

Núverandi viðurskiftini millum Danmark og Føroyar kunnu kortini undir ongum umstøðum varðveitast sum tey eru í allar ævir, tí verðin broytist jú alla tíðina. Men um fullveldið er loysnin beint nú og her, veit eg ikki.

Eg veit bara, at tað er líka so náttúrligt, at danir fara ikki at finna seg í at missa meira og meira vald, jú fleiri málsøki føroyingar yvirtaka, og samstundis enn gjalda hundraðtals milliónir til føroyingar um árið, uttan eisini at krevja nakað aftur fyri tvs. rættin til at taka avgerðir um føroyskt øki føroyinganna vegna.

Men vilja føroyingar finna seg í at vera tiknir soleiðis av ræði? Nei, ov nógv spreingievni liggur í hesi skipan, til at hon kann halda á, sum er. Vit kunnu ikki blása og hava mjøl í munninum í senn. So vit eru noydd at finna eina meira eintýdda loysn, enn ta vit hava í løtuni. Men hvør skal tann loysnin vera?

Føroyar gjørdar til skammar

Søgan hevur prógvað, at ríkisfelagsskapsskipanin í núverandi líki skapar ónøgd, ørkymlan og ósemjur landanna millum um hvørja ábyrgd, hvønn rætt og hvørjar skyldur, hvørt landið hevur innan henda felagsskap.

Danskir fjølmiðlar hava ferð eftir ferð tey nógvu seinastu árini ofta við røttum eftir mínari meting – skýrt føroyingar at vera nassarar, av tí at føroyingar ein vegin ynskja fullveldi (ella eitt serstakliga víðkað sjálvstýri), men hin vegin vilja teir – at síggja til – ikki sjálvir ofra nakað eyka fyri hetta sjálvræðið. Danir skulu bara halda á at gjalda føroyingum studning og figgja sjálvræðisgildið...!

Eftir mínari meting er føroyska tjóðin gjørd til skammar, bæði av sambandsfólki, sum so nasadjørv í fullum álvara tvíhalda um, at føroyingar eiga sjálvsagdan rætt til danskan studning og so av fullveldisviðhaldsfólkum, sum ein vegin leggja fram meira og meira víðgongdar paranoidar samansvørjingarteoriir um ónda imperið Danmark, og hin vegin kanska fyri at gera fullveldið meira etiligt fyri tey, sum ikki tora at sleppa sambandinum? í fyrstani í hvussu so er kravdu eina langa skiftistíð, har danir skuldu vera við til at gjalda fyri, at føroyingar fingu fullveldi! Hvussu rímiligt hetta enn kann tykjast nøkrum føroyingum, kunnu danir ikki sannførast um tað rímiliga í tí.

Hetta er eyðmýkjandi at vera vitni til serliga sum føroyingur í Danmark – og sjálvandi heilt óhaldbarar loysnir. Líka so óhaldbarar og eyðmýkjandi sum ríkisfelagsskapurin í sær sjálvum í núverandi líki.

Danir hava evsta valdið í ríkinum

Hesari eyðmýkjandi støðuni mugu føroyingar sjálvandi royna at berja seg burturúr aftur! Millum annað við at síggja nakrar grundarleggjandi sannroyndir í eyguni, sum summir føroyingar tykjast hava sera ilt við at viðurkenna. M.a. tann sannroyndin, at ríkisfelagsskapurin ikki er nakar felagsskapur av javnmettum tjóðum, men nettup bara eitt ríki við einari statsmakt tí donsku sum nágið loyvir tveimum þortum av ríkinum at hava partvíst sjálvstýri, men sum rættuligt hevur tann suverena avgerðarrættin yvir øllum ríkinum ífylgi grundlógini harimillum eisini Grønlandi og Føroyum.

Kortini hava føroyingar t.d. ongantíð verið – og fara ongantíð at vera viðurkendir sum javntsettir við danir um teir blíva við at kalla seg sjálvar føroyingar. Kanska eru vit danir á pappírinum í summum førum, men aldrin í eygunum á donum. Vit hava altíð verið nakað annað nakað serligt men ongantíð ein teirra. Og tað er skiljandi, tí vit eru jú heldur ikki danir. Gera føroyingar nakað gott okkurt bragd ella annað at vera erpin av, ja, so eru eingin smøl støð so eru vit danir, men líka so skjótt vit ikki uppføra okkum í trá við tað, danir kunnu samtykkja við, eru vit knappliga ikki danir longur, men forkelaðir, tvørligir, strævnir føroyingar. Er hetta ein ynskilig støða at vera í?

Ein onnur sannroynd er, at tað er ein misskiljing, at um føroyingar vilja hava fult sjálvræði, mugu teir eisini kvetta øll bond við Danmark! At klára seg sjálvan er ikki tað sama sum at klára seg uttan onnur. Einki land heldur ikki undir øllum umstøðum at føroyingar taka fulla ábyrgd av sær sjálvum og gjalda fyri seg sjálvar fyri egin mál og egna nýtslu – og harvið vinna rættin til sjálvræði, rættin til at vera egin tjóð og harvið eisini rættin til at tala egnu søk í altjóða samanhangi. Tilfeingi hava føroyingar jú ríkiligt av til at klára seg og so væl eisini – serliga nú olja er funnin í Føroyum! Føroyingar eru best útbúnað fólk í heiminum við nógv hægri livifóti enn so nógvar aðrar tjóðir, vit sammeta Føroyar við.

Men hvat við teimum rættindum vit hava nú sum danskir ríkisborgarar? spyrja summi so stúrin. Ja, vit missa nøkur fá rættindi, men ikki rættindi, sum vit ikki kunnu endurskapa ella tryggja á annan hátt. Jamen, hvat við teimum bondum vit hava í dag til familju í báðum londum? Hvat við mentanarligu bondunum? Og handilsliga sambandinum? Spyrja tey aftur. Eg má spyrja aftur-ímóti, hvi í allari víðu verð skuldu tey bondini blivið kvett, bara tí føroyingar fáa sjálvræði? Tað er jú ikki so, at telefonsambandið verður avkvett! Ella at flogførini halda uppat at flúgva millum Danmarkar og Føroya.

Framhald á síðu 17

Men tey stúra meir og spyrja: Hvat við teimum sjúku og gomlu? Eg haldi ikki føroyingar eiga at taka danska heilsuverkið fram sum nakra fyrimynd, tá tað snýr seg um at taka sær av sjúkum og gomlum! Les donsk bløð, so veist tú hví. Danir liva eisini í miðal 10 ár minni enn føroyingar í Føroyum bæði kvinnur og menn.

Eg rokni ikki við at føroyingar hava minni ábyrgdarkenslu fyri sínum sjúku og gomlu, enn danir hava, so eg dugi ikki at síggja hví ikki føroyskir politikkarar í framtíðini, um so var at Føroyar gjørdust sjálvstøðug tjóð, ikki eisini tá skuldu haft tey sjúku og gomlu høgt á prioriteringslistanum. Tað er ov grunt, um hetta skal vera einasta próvgrundin til at tvíhalda um ríkisfelagsskapin. Vit hava ríkiligt ressursurnar til framhaldandi at gjalda fyri tað sjúkuviðgerð, vit ikki sjálvi kunnu bjóða heima.

Kunnu vit anda uttan respirator?

Sjálvandi snýr tað seg eisini um at skapa eitt dygdargott berandi fíggjarligt grundarlag fyri sosialu vælferðini í Føroyum – og tað eri eg sannførd um, at grundarlag er fyri í Føroyum, um føroyingar bara umsita tilfeingið bæði náttúruna og fólksins førleikar – skilagott og við skynsemi. Serliga um føroyingar fáa rættin at gera millumtjóða avtalur m.a. við Danmark, hini Norðanlondini og EU um tey øki, har føroyingar standa knapt so sterkir t.d. tá tað snýr seg um víðari útbúgving og tann meira spesialiseraða partin av heilsuverkinum. Tað er jú ikki so, at føroyingar ikki hava nakað at bjóða aftur-ímóti. Føroyingar kunnu jú láta suverenitetin yvir føroyskum øki til danir? Finst nakar triðji vegur?

Bert spurningur um tíð

Líka mikið um okkum dámar tað ella ikki, er gongdin, at føroyingar fáa meira og meira sjálvstýri. Við sjálvstýrinum kemur eisini kravið um, at føroyingar sjálvir gjalda fyri tey málsøki teir yvirtaka og harvið gerst tankin um at taka fulla ábyrgd, tvs. stigið móti fullum veldi, so eisini meira og meira nærliggjandi heilt av sær sjálvum. Serliga nú, tá oljan fer at gera Føroyar fíggjarliga enn meira sjálvberandi og harvið eisini fíggjarliga meira óheft av Danmark.

Hvat forðar so føroyingum í at taka stigið, annað enn egið – eftir mínari meting – grundarleyst máttloysi? Alternativið er jú – um vit skulu hava eintýddar loysnir væl at merkja – at Føroyar venda aftur til at gerast eitt danskt amt, og at allar avgerðir aftur verða yvirlatnar til eina danska stjórn og eitt danskt fólkating, harav teir fægstu limirnir hava traðkað sín fót á føroyska jørð! Er tað hetta, føroyingar heldur vilja?

Nei, tí fái eg meg neyvan at trúgva. Líkamikið um vit lata eyguni upp ella aftur, so er gongdin, at Føroyar og Danmark undir øllum umstøðum mugu sleppa ríkisfelagskapinum í tí líki, sum hann hevur í dag. Tað er bert ein spurningur um tíð – og um á hvønn hátt.

Kvettið bara tey óhepnu bondini ikki tey góðu

Sjálv haldi eg avgjørt ikki, at Føroyar eiga at kvetta øll bond til Danmarkar. Eg búgvi sjálv í Danmark, og fari helst at vera búgvandi mong ár aftrat, tí eg havi bundið meg til danska familju, so eg hevði persónliga ikki verið tøkur at kvetta bondini til Danmarkar.

Men skulu vit endiliga varðveita bondini innanfyri núverandi ríkisfelagskap? Tað eru ikki øll bond, sum eru líka góð. Tey bond, sum skerja frælsi hjá føroyingum og forða teimum í at menna eitt fult demokratiskt samfelag – tey bond, sum forða fyri viðurkenningini av føroysku tjóðini og tjóðskapi føroyinga, soleiðis at føroyingar ikki kunnu møta øðrum tjóðum sum javnbjóðis partar, ja, tey bondini meti eg at vera sera óheppin. Hesi bondini eiga føroyingar tí at arbeiða fyri at loysa seg úr.

Vónandi fer valúrslitið ikki at vera eitt bakkast fyri hesum arbeiðnum. Er stundin ikki komin, nú føroyska flaggið hevur veittrað í 83 ár, at vit í felag øll sum ein taka hetta tjóðskaparmerkið okkara í fullum álvara?

Við hesum orðum fari eg at ynskja tykkum øllum eitt gott flaggdagshald!

Prísvinnarar á Listastevnu

Tá Listastevna Føroya á øðrum sinni verður sett í Norðurlandahúsinum leygardagin hin 3. august 2002, verður sjøtul settur á sekstan spennandi dagar við hópin av prísvinnarum.

Ernst Sondum Dalsgarð, ið sunnudagin varð heiðraður, tá ársins Reumert Virðisløn vórðu latnar, fer á setanini at framframføra nýtt verk, sum tónaskaldið Tróndur Bogasson hevur skrivað. Stevnudagarnar fer Ernst Sondum Dalsgarð eisini at luttaka í stórfingnari operakonsert, har m.a. Nina Pavlovsky eisini verður við.

Fyrsta Listastevnukvøldið verður eisini rokk konsert í Ítróttarhøllini í Havn við Týr og Runrig. Bólkurin Týr vann í vár donsku Melody Maker-virðislønina og forsangarin í skotska bólkinum Runrig, Bruce Guthro, sum er úr Kanada, er har í landinum kosin besti sangari, við bestu fløguútgávu í egnum nvani og sum partur av besta bólki í 2002.

Listastevnudagarnar fær rithøvundurin Jóanes Nielsen handaða norðurlendsku dramatikaravirðislønina, eins og leikur hansara, sum vinnandi handritið byggir á, »Eitur nakað land Week-end?« verður framfördur.

Danski saksofonleikarin Anders Banke, sum á Listastevnuni fer at spæla saman við brasilska Egberto Gismonti, er kosin ársins nýggja jazznavn.

Hetta í sambandi við Danish Music Awards 2002 og útgávuna »Doctor Structure«.

Sama dag, sum Listastevna Føroya verður sett, verður eisini avdúkað, hvør vinnur í kappingini um besta handritið til útvarpsleik. Vinnandi leikurin verður sendur í Útvarpinum sama kvøld.

Allar sekstan Listastevnudagarnar í august verður eitt ríkt úrval av virðisløntum barna- og vaksnamannafilmum sýndir í Havnar Bio. Teirra millum er franski filmurin »Amelie frá Montmartre«.

Íkast til politiska orðaskiftið

Hví eiga Föringar so langt eftir enn til meiri sjálvræði?

Tað er dirvið, ið trýtur, tað er tað fyrsta. Ríman um kellingina, sum »saðlaði sín gumpingrá«, passar her væl, altíð var tað onkur, sum teir ið skrifta skuldi, ikki tordi fyri. So eisini her. Summir tora ikki fyri skyldfólki sínum, aðrir vænta ein ellar annar yvirmaður verður teimum á nakkanum, gera teir nakað, og uppaftur aðrir vænta at doyggja í raki, um teir lata munnin í tvey.

Hvat mundu teir gomlu sagt um okkum sógu teir Föringar nú: »Tit eru í uppisetri sum gamlar landbukkur«, soleiðis hövdu teir tikið til. Ikki fyri tað, vit duga betri bæði at draga torsk og turka torsk enn teir gjørdi, og vit duga væl eisini betur enn teir bæði at sigla og rógva, men tað dirvi sum gjørdi mannin til mannm, friðan og sjálvbjargnan har hann stóð, hvar er tað?

Vit síggja okkara bestu menn kanske eina lötu í ungum árum gera eitt glepps ella tvey, so fara teir at himprast og áðrenn nakar veit av, er tonnin læst, hys, hys, lat tað endiliga ikki hoyrast, at Föringar vilja hava nakað ræðið, sum annað vaksið fólk, lat okkum bara vera börn, sum vit altíð hava verið.

»Börn gera barns gerningar«, hvat er tað annað nógv av tí, vit síggja avrikið hjá okkum nú á dögum. Onkur stórur maður finnur okkum upp eitt »leika« at spæla okkum við, og vit leggja doyðin á at gera so mikið út av hesum leikanum, sum möguligt, bara tí hesin sami stóru maður segði, at tað var gott hjá okkum, ella vit fara sum börn at biða »mammi« geva okkum ein sukurmola, bara ein so ela, ela pinkulítlan, vit skulu vera so góð, so góð aftur fyri og tað skal vera leingi áðrenn vit biða aftur.

Tann, sum kundi ripa nevan so í borðið, at hann gjørdi »kvökk« í barnaflokkin – so